## DAGSINS MEINING

# Franskt nei og hvat so?

Sunnudagin søgdu fransmenn á fólkaatkvøðu nei til ES grundlógina. Hetta var ikki heilt óvæntað, tí at meiningsmátingar hava víst eitt nei í tíðini uppundir fólkaatkvøðuna, men óansæð er hetta er eitt álvarsligt bakkast til Chirac forseta, og ivasamt er, hvussu leingi sitandi stjórn í Frankaríki heldur fram.

Allastaðni í Europa verðru sagt, at grundlógin ikki er deyð og at tær fólkatkvøður, ið ætlanin er at hava, verða hildnar. Tann næsta verður í Hollandi longu mikudagin, og tað verður áhugavert at síggja, hvussu leikur fer. Óansæð hvat hollendarar og hini londini siga, so má eitt franskt nei metast at verða eitt álvarligt skot fyri bógvin hjá ES Grundlógini, eftirsum tað er ringt at ímynda sær, at nakað verður framt í ES uttan franska medvirkan antin so ella so.

Undanførslurnar fyri franska nei'ið eru nógvar, harímillum generell ónøgd við Chirac og misnøgd við ætlanini at loyva Turkalandi uppí ES. Tað kann verða, at hetta eru faktorar, ið hava ávirkað, men um hesir faktorar hava givið útslagið, so hevur undirtøkan verið ov lítil óansæð. Spurningurin er, um ikki hetta er eitt gott dømi um fremsta trupulleikan við ES, ið er væntandi fólkslig undirtøka. Hetta skal ikki skiljast sum mótstøða móti ES sum so, men tað vísir seg, at hvørja ferð ein traktat skal atkvøðast ígjøgnum, so hendir tað so at siga altíð við sera smølum meiriluta. Vit kunnu bert minna um Maastricht avtaluna, ið so bleiv lappað við Edinburgh avtalini, eftir at Maastricht fall. Kann eitt samstarv millum 25 lond verða bygt uppá, at man hvørja ferð akkurát fær skavað ein meiriluta saman í teimum ymsu londonum? Hvussu kann undirtøkan tryggjast uppá sikt, um marignalarnir altíð eru einstøk prosent? Hetta eru spurningar, ið ES londini mugu tosa um komandi tíðina.

Fyri okkum her í Føroyum var eitt franskt nei ikki óbetingað ring tíðindi. Uppá stutt sikt kemur franska nei'ið at ávirka okkara búskap. Euro gjaldoyrað fall mótvegis dollarnum eftir fronsku fólkaatkvøðuna, og fer framhaldandi at fella komandi tíðina. Hetta kemur at ávirka donsku krónuna, og sostatt okkum. Fer danski búskapurin at vikna, so fylgja vit við í ein ávísan mun, men tó kunnu eisini fyrimunir verða fyri føroyskan útflutning til ávísar marknaðir, um krónan viknar eitt sindur. Á tí positivu síðini, so er Staturin Europa ein hóttan móti fríhandli við lond uttan fyri múrarnar á tí, ið viðhvørt verður nevnt "Europaskansin". Vit kenna ES protektionismu á okkara kropp sum er, og tað eru eingi tekin um, at henda protektionisman verður minni við øktari integratión. Heldur tvørturímóti. Eisini gevur eitt franskt nei til ES grundlógina okkum eitt skoðbrá, at tosa um, hvussu okkara viðurskifti við Danmark kunnu ávirkast av einari slíkari grundlóg.

Grundlógin var helst yvirmett av bæði teimum bjartskygdu og teimum dapurskygdu. Grundlógin hevði neyvan verið tann kollveltingin, ið hesir báðir áðurnevndu bólkar gera hana til, tí hon hveur ein rættiliga generellan karakter. Tó eru stórveldistankar at síggja í henni við t.d. einum ES forseta og einum ES uttanríkismálaráðharra. Nú fáa vit í hvussu so er nøkur ár, at diskutera hesi tingini í.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Høgakei og Lágakei eru ikki eftir bókini

**Beate L. Samuelsen**
*Býráðslimur í Havn*



Ein ódámligur málsviðgerðarháttur er byrjaður í Tórshavnar Býráð, har arbeiði verða sett í gongd undan nevndarviðgerð og uttan at peningur er játtaður fyrst

Tá borgarstjórin í Tórshavnar Kommunu, Heðin Mortensen, í einum blað fríggjadagin verður endurgivin fyri at siga, at alt er farið fram eftir bókini í sambandi við arbeiðið framvið Müllers Pakkhúsi, Lágukei og Høgukei, so eri eg absolutt ikki samd við honum í tí.

Hvat hetta er fyri ein bók, hann hugsar um, veit eg ikki. Kenni hana ikki. Kann vera, at rithøvundur í nánd av borgastjóranum er í ferð við at skriva eina slíka bók, Ja, man veit ongantíð. Andstøðan kennir einki til hana.

Einasta eg veit, er, at á býráðsfundinum hóskvøldið 26. mai 2005, atkvøddi eg ímóti hesum máli um Høgukei og Lágukei og málinum, sum snúði seg um innrættan av eini starvsfólkamatstovu í kjallararanum undir Gamla Posthúsinum.

Starvsfólkamatstovan skal nýtast gerandisdagar, og í vikuskiftum skal hetta vera ein útatvend matstova. Hvat er ein útatvend matstova? Havi ongantið hoyrt orðið áður.

Ikki tí, at eg havi nakað ímóti hesum báðum ætlanum, men eg vil til eina og hvørja tíð harðliga mótmæla tí mannagongd, ið málini hava fingið í teim nevndum, tey hoyra heima. Nevniliga, at arbeiðini eru sett í gond, áðrenn nevndarviðgerð og uttan, at peningur fyrst er játtaður.

**Telefonpraj**

Í samgonguni meta tey arbeiðini sum tað bera peanuts.

Tað geri eg ikki. Eg neti hesi mál sera álvarsligat vera. Hetta eru arbeiði, sum ávikavist eru mett at kosta kr. 800.000 kr. (pluss kr. 800.000 aftrat, sum Havnarnevndin skal fíggja) og kr. 900.000, tilsamans 1,7 mió. kr. í býráðsins lut

Í tí førinum, har Havnanevndin skal fíggja sín part av keiunum við Müllers Pakkhús, hevur málið ikki fingið nakra viðgerð annað enn, at formaðurin í nevndini, Leivur Hansen, hevur ringt runt til nevndarlimirnar og spurt, um teir høvdu nakað ímóti, at kr. 800.000 vóru nýttar til hetta arbeiðið.

At samgongan við borgarstjóranum knappliga hevur fingið ilt í politisku samvitskuna ella eisini hevur fingið nøkur orð frá okkara nýsetta løgfrøðingi um líka at fáa hasi tingini uppá pláss, eftir arbeiðini eru sett í gongd fyri skattaborgarans pengar og uttan játtan um fígging á rætta stað, er alla átalu vert.

Hetta er præcis tað, sum sitandi samgonga í Tórshavnar býráð er farin at arbeiða eftir. Brúka pengar til alt, sum kann tekkjast borgarunum uttan at játtanin er fingin til hetta.

Fekk eitt tips um hetta, tá hendan samgongan var veruleiki, men trúði tí ikki.

Hevði forsvorið, at tað kundi blíva so galið.

**Spurningar ikki svaraðir á rætta stað**

Allir teir spurningar, sum undirritaða setti á býráðsfundinum hóskvøldið í sambandi við hesi bæði arbeiðini, sum sett eru í gongd, áðrenn játtanin um pening vóru givin, hvør sett hevði arbeiðini í gongd, og hvør hevði fingið arbeiðini, vóru ikki svarað.

Tað mátti bíða til dagin eftir, segði borgarstjórin. Tá fór hann at senda eitt skriv út, og kundi eg sum ganska gemenur býráðslimur fáa svar uppá teir spurningar, sum eg setti fram á býráðsfundinum.

Sum grundgeving fyri hesum, upplýsti borgarstjórin, at tað komst av innlitinum í málinum um Høgukei og Lágukei, sum ein annar býráðslimur, Jan Christiansen, vikuna undan hevði biðið um. Umsitingin var sett til at arbeiða yvir, segði hann, og skuldi hon nýta alla náttina, náttina til fríggjadagin, um neyðugt fyri at fáa skjølini til umbidna innlitið til vega.

Ein løgin framferðarháttur, eg má so siga. Áheitan Jan Christiansens um innlit hevði einki við mínar spurningar at gera.

Men soleiðis verður lagið komandi tíðina í Tórshavnar kommunu, góðu borgarar. Tað gjøgnumskygnið, sum tveir av tjóðveldislimunum í Býráðnum tosaðu seg hásar av sum andstøðulimir undir seinastu fýra ára býráðssetu, er líka sum døggað eitt sindur til, síðani teir komu framat og nú bóltað sær sum best ber ti.l

At hinir limirnir taka undir við teimum, skilji er ikki, tí har skuldu verið nøkur skilafólk ímillum.

Vil líka upplýsa, at í einum skrivi frá borgarstjóranum dagin eftir býráðsfundin, er upplýst, at tað er Guttesen & Staksberg, sum hevur fingið bæði arbeiðini, sum málini snúgva seg um, bæði tað við Høgu- & Lágukei og Posthúsið.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]


**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.